# Enn eitt nám í Grønlandi



Avstralska námsfelagið Rimbal Pty Ltd. hevur gjørt av at fara undir námsvinnu í Suðurgrønlandi. Talan er um at vinna evnið eudialyt, sum verður brúkt á virkjum, sum gera prýðislutir. Evnið er funnið í einum øki nærhendis býunum Qaqortoq og Narsaq, sigur KNR. Á einum kunnandi fundi í síðstu viku greiddi avstralska felagið frá, at tað skal hava minst 80 fólk til arbeiðis, og at námið ætlandi fer undir vanligan rakstur um tvey ár.

# Lækkið mvg'ið á gerandisvørum

Samtak mælir til at lække mvg'ið á mjólk, breyði, mjøli, frukt, grønmeti og øðrum neyðugum húsarhaldsvørum fyri at lætta um í føroysku húsarhaldunum. Henda lækkingin hevði verið tann besti skattalættin, og hetta stig rakar eisini sosialt rætt. Samtak sigur í tíðindaskrivi, at um mvg'ið hevði lækkað til 10% á neyðugum húsarhaldsvørum, so skuldi forbrúkarin einans rinda 10 kr omaná hvørjar 100 kr í mun til 25 kr, sum tað er í dag, og hetta hevði gjørt alstóran mun í gerandisdegnum. Tað ber ikki til at gera nakað við altjóða prísirnar á eitt nú korni og olju, men landið hevur kortini møguleika at ávirka prísirnar á gerandisvørum umvegis mvg skipanina

# Gev okkum fótbólt – ikki

**Hóast ikki færri enn tveir landsstýrismenn eru búsitandi í Streymnesi, er ikki serliga stórur áhugi fyri politikki manna millum í økinum. Tá er nógv størri áhugi fyri EB/Streymi!!**

VALFEPUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*




*Hansina Johannesen heldur, at sjúkrahúsverkið eigur at raðfestast høgt*

**Streymnes:** - Ja, tað er vist. Tá vit tosa um fótbólt, tá eru øll við. Tað er tað, sum hava vit áhuga fyri, siga fólk á gøtuni.

Í góðveðrinum hósdagin í farnu viku var valbussurin hjá Sosialinum og Rás 2 á vitjan í Streymnesi. Her er rættiliga stórur spenningur er um valið, nú Heðin Zachariassen og Magni Laksáfoss eru valevni til løgtingsvalið.

Tann fyrri er eitt kent andlit í kommunalpolitikki og landspolitikki, meðan hin ikki kom á tann politiska leikpallin, fyrrenn í fjør tá nýggjur maður skuldi finnast at stýra búskapinum og fíggjarstøðuni í landinum.

Hinvegin kann staðfestast, at fólk ikki til fulnar geva sær far um alla mongdina av valpropaganda sum floymir oman yvir tey í hesum døgum.

Høvuðsvalevnini í bygdini hava tí eitt stórt arbeiði at fara undir, at gera fólkini tilvitað um politikk og um at júst tey eiga at atkvøða fyri sær.

- Jú, vit hava báðir eitt arbeiði at gera, siga Magni Laksáfoss og Heðin Zachariasen sum búgva bert eitt hanagleiv frá hvørjum øðrum á Streymnesi.

Við valið fyri fýra árum síðani var Fólkaflokkurin størsti flokkur í Hvalvík við 115, meðan Sambandsflokkurin fekk næstflestar atkvøður men helvtina færri, nevniliga 57. Við hetta valið hevði Fólkaflokkurin eina framgongd uppá sløk 12 %, meðan Sambandsflokkurin hevði eina afturgongd uppá sløk 10%.

Men við seinasta fólkatingsval var munurin minni millum flokkarnar. Tá fekk listi A 86 og listi B 49 atkvøður.

## Fótbólt – ikki politikk

Ein vitjan í hesi lítlu bygdini við sínum 205 íbúgvum vísir bert, at áhugin fyri tí politiska orðaskiftinum kundi verið munandi størri.

Fólk vita sjálvandi at løgtingsval er í hondum, men annars er áhugin fyri tí millum lítil og eingin. At tosa og kjakast um politikk tykist heldur vera nakað fyri tey útvaldu, og ikki fyri Palleba og Marsannu í Streymnesi.

- Noy, við tosa um nakað heilt annað – fótbóltsfelagið EB/Streymur. Teir hava vant spakuliga í vetur, men mánadagin – tað er: í dag – byrja teir av álvara at venja uttandura.

- TAÐ er meiri handgrípiligt og TAÐ hava vit áhuga fyri. Ikki politikkinum, siga fólk á gøtuni.

Hinvegin kann staðfestast, at tá val er so gera fólk kortini sína skyldu og møta upp við valstaðið: Í 2002 vóru 90,1 % av veljarunum á vali, men tá valið var í 2004 var talið hækkað heilt upp í 92,2.

Hetta var 0,1 % hægri enn miðaltalið kring landið.

## Tveir landsstýrismenn

Av røttum áttu fólk í økinum at havt stóran áhuga fyri tí politiska orðaskiftinum. Ikki færri enn tvey valevni eru úr Streymnesi, enntá tveir landsstýrismenn. Hetta er fyrstu ferð nakrantíð at tveir landsstýrismenn eru úr hesi bygdini.

Talan er um fíggjarmálaráðharran Magni Laksáfoss úr Sambandsflokkinum og sum er uppstillaður í Suðurstreymoy og innlendismálaráðharrin, Heðin Zachariasen sum er uppstillaður fyri fólkaflokkin í Norðstreymoy.

Tað serstaka við hesum er, at sambært veljarakanningini, ið varð almannakunngjørd í Sosialinum um vikuskiftið, so hava báðir ein sess í nýggja løgtinginum.

Við valið í 2004 fekk Heðin 111 av 115 atkvøðum í Hvalvík, meðan Magni Laksáfoss fekk 80 atkvøður í Norðoyggjum, og var í roynd og veru bert nr. 3 á listanum.

## Stuttligt orðaskifti

Arbeiðsfólkið hjá Norðsetur í Hvalvík hava úr at gera við at nøkta tørvin hjá fólki, ið ynskja hús frá teimum.

Men tey skulu sjálvandi hava matarsteðg við millumbilum, og er hetta ein løta sum menn gleða seg til. Gott er at fáa ein bita og haraftrat er sera stuttligt at lurta eftir teimum tilkomnu monnunum, sum hava góða hylling á politikki.

Serliga tveir teirra plaga at vera sera íðnir í tjakinum um politisk viðurskifti. Soleiðis hevur verið, og tað er ikki vorðið stórt frægari, nú tað av álvara er farið at stunda til val.

- Teir duga sera væl at tjakast og duga eisini sera væl at øsa hvønn annan upp. Tú kanst ætla, at tá ein tjóðveldismaður og ein sambandsmaður tjakast um politikk, tá eru teir ikki heilt samdir um alt.

- Teir duga sera væl at taka til, og vit aðrir sita bara í skellilátri at teimum. Teir eru fínir, sigur eitt av arbeiðsfólkunum á virkinum.

Eitt annað av starvsfólkunum á Norðsetur er 19 ára gamli Torfinn Djurhuus úr Hvalvík. Hann var fyrstu ferð á vali í november, tá fólkatingsvalið var, og skal nú á fyrsta sinni greiða atkvøðu til løgtingsvalið.

Sjálvur hevur hann fylgt nakað við orðaskiftinum í bløðum og fjølmiðlum, men saknar at valevnini

> *Tú kanst ætla, at tá ein tjóðveldismaður og ein sambandsmaður tjakast, tá eru teir ikki heilt samdir um alt*
>
> *(Starvsfólk á Norðsetur)*